# Føroyskur jarðfrøðingur arbeiða hjá Statoil

*Petur André Norðgerð úr Lorvík skal 13. februar byrja arbeiði hjá stóra oljufelagnum Statoil. Hann skal vera við í tí spennandi tulkingararbeiðinum av seismiskum tilfari úr Føroyum*

Áhugin hjá útlendskum oljufeløgum fyri Føroyum er framvegis stórur. Í hesum døgum fáa fleiri oljufeløg tær fyrstu seismisku upptøkurnar frá amerikanska felagnum Western. Eitt týðandi lið í leitingini eftir olju og gassi í føroysku undirgrundini byrjar tí í næstum, tá oljufeløgini hvør sær og saman fara undir at tulka tilfarið frá Western.

Eisini føroyingar vera við í hesum tulkingararbeiðinum. Stóra norska felagið Statoil, sum er eitt av teimum feløgunum, ið hevur víst sera stóran áhuga fyri føroysku undirgrundini, hevur boðið einum føroyskum jarðfrøðingi arbeiði - fyribils í tríggjar mánaðir - at vera við í tulkingini av seismiska tilfarinum.

Tað er Petur André Norðgerð úr Lorvík. Hann tók prógv sum jarðfrøðingur í Århus í 1992.

Herfyri var hann ein mánað á høvuðsstøðini hjá Western í London og kundi har fylgja við dataviðgerðini av seismiskum tilfari úr Føroyum.

Hetta var sera áhugavert arbeiði fyri meg og vóni eg nú, at komandi tíð hjá Statoil ikki verður minni áhugaverd sigur Petur André, sum hevur tikið sergrein í geomagnetismu. Hetta er nakað, sum eisini verður brúkt í sambandi við leitan eftir olju.

**Byrjar í næsta mánað**

Petur André skal byrja í nýggja starvi sínum 13. februar. Tá skal hann møta á skrivstovuni hjá Statoil í Keypmannahavn.

Statoil hevur keypt seismiskt tilfar frá Western saman við tveimum øðrum stórum oljufeløgum, Enterprise og Mobil Oil.

Ætlanin er at Petur André skal arbeiða hjá hesum báðum feløgunum eisini. Tað verður so í London.

Eg veit væl, at hetta møguliga bert er arbeiði eitt avmarkað tíðarskeið, men tað kann vera eitt springbretti víðari, um útlit verða fyri at finna olju heldur Petur André fyri.

Sjálvur heldur hann góðar møguleikar vera fyri at finna olju í føroysku undirgrundini, nú olja er staðfest so tætt upp á okkara marki.

Tað var sum limur í felagnum Føroya Oljuídnaður, at Petur André kom í samband við útlendsku oljufeløgini.

jan




*Petur André Norðgerð hevur sum fyrsti føroyski jarðfrøðingurin fingið arbeiði hjá eini útlendskari oljufyritøku. Mynd kalmar*

# Nýggir maskinsmiðir



*Í farnu viku stóðu hesir sveinaroyndina á Tekniska Skúla í Havn. Fremst frá vinstru: Helgi Joensen, Tvøroyri, Petur Joensen, Tvøroyri, Petur Klein, Tórshavn, Bogi á Lakjuni, Fuglafjørður, Tryggvi Ludvig, Tvøroyri, Arthur B. Olsen, Rituvík, Johan Eli Petersen, Klaksvík, Magni R. Petersen, Strendur, Janus Poulsen, Klaksvík, Samson Poulsen, Fiði, og Høgni V. Sigurðsson, Svínair*

## VALUTAKURSIR

| | | 17.01.95 | Ultimo síðsta mán. |
|---|---|---|---|
| USA | Dollari | 603,55 | 612,15 |
| Bretland | Pund | 945,22 | 952,02 |
| Týskland | Markur | 393,96 | 392,66 |
| Svøríki | Króna | 80,96 | 82,00 |
| Noreg | Króna | 90,12 | 89,92 |
| Frakland | Frankur | 113,96 | 113,57 |
| Belgia | Frankur | 19,121 | 19,106 |
| Sveits | Frankur | 469,47 | 464,03 |
| Holland | Gyllin | 351,29 | 350,58 |
| Italia | Liri | 0,3765 | 0,3743 |
| Finnland | Markur | 127,55 | 129,15 |
| Ísland | Króna | 8,91 | 8,95 |
| Eysturríki | Skillingur | 55,988 | 55,802 |
| Spania | Pesetas | 4,529 | 4,625 |
| Portugal | Escudos | 3,813 | 3,815 |
| Kanada | Dollari | 427,38 | 435,85 |
| Japan | Yen | 6,1070 | 6,1387 |
| Írland | Pund | 934,78 | 942,28 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,532 | 2,535 |
| | XEU | 746,17 | 745,97 |

Kelda: Føroya Sparikassi

**Eliaskirkjan,** Vesterbrotorv 49

Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19.00.

Bussarnir 6, 16, 28 og 41 steðga nærindis.

Nærri fæst at vita á tlf. 031-242268 ella 031-578999.